

*Spælivinir hjá Marthu.* ***Tær aftastu*** *tríggjar genturnar eru: Ragna Hansen, Poula Mørkøre og Hilda Eriksen.* ***Fremst f.v.*** *Mutte Thygesen, Martha sjálv, Malla Egholm, Signhild Eriksen og Nella Egholm*



*Húsini í C. Pløyensgøtu, har Anna og Martha vuksu upp*



*Thygesen var dómari. Her sæst familjan hjá honum. Martha plagdi at spæla við Mutte, sum er stóra gentan á myndini*



*Jákup hevur verið í Vágsbotni og keypt fisk*

starv sum pedellur við tá nýggja realskúlan, sum liggur beint við kommunuskúlan í Tórsgøtu. Hetta kundi eisini geva nógv arbeiði. Tað fasta var, at hann skuldi kyka, áðrenn børnini komu í skúla, og á vetri var kavarudding ein av hansara uppgávum. Og tá var jú meira kavi enn nú! So her skuldi ofta farast tíðliga upp.

## Keyptu mjólk og skóru torv

Heima hjá Onnu og Marthu høvdu tey ikki kúgv, sum var vanligt at hava í Havn tá. Fyri at hava kúgv, var neyðugt at hava trøð, og tað høvdu tey ikki. Annars var ikki heldur pláss fyri kúgv, tí verkstaður var í kjallaranum. Við tí fulltíðararbeiði, sum Jákup hevði, var ikki eins neyðugt hjá honum at hava trøð sum hjá teimum, sum ikki høvdu so fasta inntøku. Tey høvdu tó hønur. Mjólk fingu tey frá Óla á Kák og seinni frá meiarínum.

Men teirra húski var tó merkt av "stórbýnum", soleiðis at nógv varð keypt. Tey keyptu hjá Evensen, sum var ein av stóru fyritøkunum í Havn tá í tíðini.

Tískil varð døgurðamatur eisini keyptur í ein fittan mun. Men tær báðar mintust tó, at tey fingu blóðpylsu. Pápin plagdi at fletta fyri apotekaran Djurhuus, og fyri hetta fekk hann avroðini og tískil eisini blóðið afturfyri. Tað varð goymt á verkstaðnum, har borsýra, sum varð selt undir navninum Aseptin, varð koyrd í fyri at varðveita tað. Hetta hevði neyvan verið loyvt í dag. Men hetta skaddi tey tó ikki!

Tey plagdu eisini at fáa nátar frá ættini í Nólsoy. Tá skyldfólkini úr Nólsoy komu til Havnar, plagdu tey at hava seið og mjólk við sær. Serliga mintist Anna til ommubeiggjan, Johan við Garð, sum var verfaðir tann kenda skiparan Mortan í Hvannasundi. Her kann skilast til, at mjólkin hevur verið ein luksusvøra, í hvussu er fram til 1908, tá meiaríið við "Ruth" kundi fáa mjólk frá bygdunum.

Eins og havnarfólk gera í dag, fór pápin oman í Vágsbotn at keypa fisk, og hava vit eina stuttliga mynd, sum Anna hevur tikið av pápanum við tveimum teggjum.

Men tey skóru torv, og var hetta uppi við sápufabrikkina á veg niðan til Hoydalar. Tað var fast, at byrjað varð við torvskuri grundlógardagin. Hendan dagin kyndu tey eisini eld í haganum og hugnaðu sær.

## Bygdargentur vaskaðu hárið í landi

Havnin var so framkomin, at her fekst sápa. Anna og Martha mintust tí einki til at vaska í landi, sum annars er besta sápan, sum finst. Men tær mintust, at ein vestmannagenta búði eitt skifti hjá teimum, og hon hevði eisini eina systir í Havn. Aðru hvørja viku vaskaðu tær hárið hjá hvørji aðrari í landi. Anna og Martha mintust, hvussu hárið hjá teimum glansaði!

Tað hoyrir við til hesa søgu, at landið, sum varð nýtt at vaska hárið, skuldi standa eina tíð. Og so skuldu bert dropar í sjálvan løgin, og aftaná varð vaskað við sápu.

## Gøtuljósini vóru 10 linjurs petroleumslampur

Eitt, sum var nógv øðrvísi tá enn nú, var ljós. Tey brúktu petroleumlampur, men undir 1. heimsbardaga, tá petroleum ikki fekst, máttu tey nýta lýsilampur. Hesar dálkaðu illa, men sum frá leið fingust lampur, sum minkaðu um hendan vansan. Nyholm Debes var ein av teimum, sum "uppfann" eina slíka lampu. Tað funnust eisini onnur modell.

Anna greiddi frá, at "frú Joensen", kona Grønlands Johan, kom við hesum modellinum úr Grønlandi, har hann hevði verið kolonistjóri. Kona hansara Amalia var dóttir gamla H.C. Müller.

Anna mintist, at kúlulýsi av grindahvali var tað besta brenni til lampurnar. Men meðan tað í dag bert skal trýstast á ein knøtt fyri at fáa ljós, mátti lýsið fyrst bræðast!

Tá vóru eisini gøtuljós, men tey vóru eisini øðrvísi enn í dag, har tey tendra og sløkkja av sær sjálvum. Tað fyrsta, Anna mintist til gøtuljós, vóru 10 linjurs petroleumslampur, sum vórðu hongdar í steyrar fram við gøtuni. Tær mundu meira hava verið ætlaðar at vísa, hvar vegurin var, heldur enn at lýsa upp. Men hetta var eisini ein framúr nytta. Seinni vóru tað "stormking,"